# Skúlin á odda í stríðnum fyri javnstøðu

**Vit skulu hugtøkum sum buldrasligir dreingir og stillar gentur til lívs, tí bæði kynini skulu hava rúm at menna seg sum fríar menniskjur. Og har gongur skúlin á odda. Ráðstevna um var evnið í dag.**

**SKÚLI OG JAVNSTØÐA**

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Útnorðurráðið skipar í hesum døgum fyri javnstøðuráðstevnum í Norðurlandahúsinum, har evnini eru javnstøða í skúlanum og í lógini.

Ráðstevnan um skúlan varð sett í dag, og vóru millum annað Kaj Leo Johannesen, løgmaður, og Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í skúlamálum, millum norðurlendingarnar, sum søgdu frá.

Hóast eini 100 fólk luttóku, var syndarligt at síggja, hvussu illa føroyski lærarahópurin var umboðaður. Sum altíð, tá almenn tiltøk eru um skúlamál fyri lærarum og skúlafólki, er orsøkin helst tann, at føroyski lærarin sleppur ikki á skeið og til eftirútbúgving í arbeiðstíðini, tí arbeiðstíðir og ráðlegging eru so fastløgd frammanundan. So spurningurin er, hvat endamálið er við slíkum ráðstevnum, tá lærarin í fólkaskúlanum ikki tekur lut.

Les meira um ráðstevnuna í Norðurlandahúsinum í Sosialinum í morgin.



*Eini 10 fólk úr allum Norðurlondum høvdu framløgur fyri einum umleið hálvsettum sali í Norðurlandahúsinum í dag.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*




# Spírið umvælast



Seinastu vikurnar hevur eitt stillands staðið kring tornið á Havnar Kirkju. Menn eru í ferð við at pussa sjálvt tornið, klokkurnar og spírið upp.

Í gjár loystu menn so spírið av og ein stórur krani loraði tað niður í ein lastbil, og nú er verður tað so pussað upp.

Tornið er seinasti parturin í einari umfatandi umvæling av kirkjuni, sum hevur staðið upp á í nøkur ár. Umvælingin og upppussingin av torninum er mett at vara einar tveir mánaðir, og tá tað er liðugt, er kirkjan øll næstan sum nýggj.

**(-leo)**